# Útlendingamálið enn einferð

JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður



Rættiliga eyðkent fyri ta støðu, landsstýri og samgonga ofta koma í, sæst í týsdagsútgávuni av Sosialinum. Á forsíðuni rópar Jóhan Páll Joensen, umboð fyri arbeiðsgevararnar neyðarróp eftir arbeiðsmegi, meðan Sonja Jógvansdóttir, umboð fyri arbeiðstakararnar inni í blaðnum gremur seg um, at eg og Javnaðarflokkurin við uppskotinum um broytingar í útlendingamálinum vilja elva til ruðuleika á arbeiðsmarknaðinum.

So kann ein spyrja. Hvat er tað fyri ein loysn, landsstýrið hevur lagt fyri tingið, tá báðir partar tykjast meiri ella minni ónøgdir. Jú, vit hava júst funnið eina hóskandi fyribilsloysn, ið beinanvegin gevur arbeiðgevarum møguleika at fáa meira fremmanda arbeiðsfólk til landið, samstundis sum arbeiðstakararnir kortini hava ta trygd, at hesin møguleikin steðgar, tá arbeiðsloysið fer uppum 3,5%.

Við hesum hevur landsstýrið tilgóðasæð bráðfeingistørvin hjá vinnuni, samstundis sum lagt verður upp fyri ótryggleikanum hjá arbeiðstakarunum. Hetta skuldi verið ein góð fyribilsloysn, so leingi partarnar á arbeiðsmarknaðinum ikki eru komnir ásamt um eina fastlønarskipan, og so leingi sum eftirlitsskipan landsstýrisins ikki er farin at virka til fulnar.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum hevur í alt ov langa tíð verið hon, at vinnan hevur tørvað arbeiðsmegi, uttan at landsstýrið hevur loyst trupulleikan. Hetta hevur ivaleyst havt við sær, at búskapurin hevur verið fyri afturstigum, og tað gagnar so avgjørt ongum í samfelagnum. Hinvegin má landsstýrið eisini tryggja, at landið ikki verður opnað fyri fremmandari arbeiðsmegi í so óðum verkum, at aðrir trupulleikar verða skaptir sum frá líður.

Eg eri sera harmur um, at tað tók so drúgva tíð at fáa málið lagt fyri tingið. Men orsøkin var í stuttum, at vit (Javnaðarflokkurin) ynsktu at mýkja málið so mikið, at arbeiðstakarafeløgini kundu liva við uppskotinum.

Tí er tað ikki sørt ørkymlandi, at Sonja leggur eftir mær og Javnaðarflokkinum. Men soleiðis er so mangan. Men tá Sonja sigur, at eg ikki havi megnað at fingið skipaða viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, so lat meg minna hana og øll onnur á, at tað hevur ongantíð verið gott latín, at politikarar leggja seg út í viðurskifti, sum partarnir varða av.

Mín greiða fatan er, at vit eru komin so langt við hesum uppskoti, sum til ber. Loysnin hevur næstan bæði selar og reim. Ásetingin um, at lógin gerst óvirkin, um arbeiðsloysið fer upp um 3,5%, er beinleiðis trygd fyri, at útlendsk arbeiðsmegi ikki ótálmað sleppur inn í samfelagið. Framíhjárættur in er loystur so langt, at skrivlig tilsøgn frá FAG liggur um samráðingar um eina fastlønarskipan til flakvirkisvinnuna. Longur røkka ikki okkara møguleikar. Nú er tað upp til partarnar at fáa loyst málið.

Eg má siga, at Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við hesum málinum hevur víst sera gott politiskt handalag. Haraftrat hevur hon fráboðað, at ein útlendingastova verður sett á stovn, umframt at útlendingamálið veður yvirtikið komandi ár.

Sonja sigur í endanum av sínum glepsi, at enn sita fakfeløgini spent og bíða. Tað er júst trupulleikin. Nei, nú er ikki at bíða. Nú er at fara til verka og fáa gjørt eitt gamalt ynski um fastlønarskipan til veruleika. Eg rokni við, at nógvir av tykkara limum bíða í spenningi.

Latið nú tingið fáa arbeiðsfrið til at avgreiða málið. Tað tænir øllum pørtum.

# Rokskiparin og eg

HJALMAR N. POULSEN
Vestmanna



**Misingin er av á hesum sinni. Fullmánin avtekur so líðandi aftur enn einaferð. Óluksáliga gott, ikki at skula liva av at rekja línu, skera agn, egna, taka olju og proviant, seta og draga, drepa torsk, avreiða og koma heimafur til betra partin av hjúnabandinum. Nei, misunt verður ikki teimum, sum tað gera**

Hóast tað ikki er illa meint, er mær sagt, at síðsti idioturin ikki er føddur enn.

Vinmaðurin kom fram við, rokskiparin, sum ikki visti, hvussu hann skuldi stytta sær stundir. Hevði bøtt trol og fekk gænir. Legði mær soleiðis til at fara til fjals við slongitráðu og spinnara at fiska síl.

Jú gaman í, men hvussu skuldu vit báðir bera okkum at í lágættarstormi við ælingi, og eygum, sum krevja langar armar og fittar fingrar, at knýta nylonknút á spinnara? Sjáldan er tilkomin sjómaður ráðaleysur, tí bleiv snapplásið íknýtt í lága kjallararúminum.

Vælklæddir í yvirlilsilsdraktum komu vit umsíðir til ásetta staðið, sum sambært forfedrum okkara skuldi verða avbera gott, hvat sílaveiðu viðvíkur.

Grammur, sum ikki einaferð, hoppaði hann úr førarasetrinum í dýra 4-hjólstrekta japanaranum. Treiv eftir tráðu síni og slongdi út. Guddoy! Áfast var beinan veg. Rokskiparin, fimur og fúsur, hevði fingið tvær penar bleikjur, áðrenn eg yvirhøvur var komin úr bilinum, kasta mær av vatninum, og var til reiðar við tráðu míni. Spennandi, hugsaði eg glaður hansara vegna, at hann ikki bleiv ongul í reyv.

Standi við vatnsbreddan, tráðu í hond og "spinni". Tolin sum altíð, mest sum í øðrum heimi, við tankum mínum um skapanarverkið, Guds undurfulla mátt og megi, hydroforiskar kreftir, regn og lágættarstorm.

Áðrenn langt um longi, tørnaði fyri hjá mær. ”Gellan” var so trivalig, at eg onki formáddi mær sum sílafiskari. Vinmaðurin gav mær í neyðini praktiskar fiskivegleiðingar. Alíkavæl kláraði hon at tøma spæltrumluna fyri nylon. Eg mátti sanniliga út í, bleiv vátur um brøkurnar. Men tá herðindini vórðu av, hevði eg kortini munin. Aftaná tógvi stríð, lirkan og lumpan, eydnaðist at fáa hana inn at breddanum. Harragud, tað var gott, at rokskiparin fekk sparkað trivaligu errjuna uppá turt, tí spinnarin loysnaði júst í hesi stund. Hann bankaði nakkan í stein, og vit fóru ovurfegnir niðan móti jeepinum við 28” - errjuni ímillum okkum. Vorðið sum, reypaðu eitt sindur og fingu okkum eina cigar. So aftur at fiska.

Cigarin meir enn hálvroykt. Útslóknað. Gud havi lov og takk, nú var áfast afur hjá mær. Hesuferð var tað ein stór bleikja, sum tó í støðd og styrki, ikki rættiliga stóð mát við ta fyrru errjuna.

Raggadropin hongur, ælingur og vindurin veksur. Brillurnar døggast, komin fastur í botn. Rykki og skrykki. Endin er, at tað loysnar. Men hvat? Spinnarin brestur úr botni og beint í nøsina. Agnhald stendur djúpt innanfyri í klivaranum. Nú eru góð ráð dýr! Hóast alt, glaður yvir at døggutu brillurnar umsíður koma til sín rætt, sum verjuskjøldur fyri eygu tvá. Best man verða at gevast og fáa tútin frían.

Sparingar á sosiala postinum á landsfíggjarlógini, merkjast ofta manna millum. Av hesi orsøk hava vit í Vestmanna sjáldan tøkan lækna. Tí valdu vit at greiða konsultatiónina á forsetrinum í jeepinum. Skolaðu nøs og spinnara í ”lívsins vatni”, samstundis sum tungan hekk uttanborða í opnum gapi.

Vinmaðurin royndi seg sum doktara. ”Eg má so siga,- seigt sum jødaforhúð”: Letur í rokskiparanum. Men hann er vanur at greiða línu og egna, hugsaði eg við mær sjálvum. Júst hesin fimleiki hjálpti væl til at krøkja ígøgnum og klippa av við hvøssu bítitongini. Í somu vending brast stumpurin við agnhaldinum burtur úr tútinum og vekk. Turkaðu bløðingina, so aftur at "skola nøs og skola nøs”.......

Kvøldið eftir fekk kona hansara ongul í reyv,- bókstavuliga sagt; tí tá hon kom aftur frá bindiklubba við jeepinum, stóð stumpurin við agnhaldinum fæstur í rumpuni á henni.

”Men hvad kan man gjøre ved saadanne mænd, der ikke have snøre i eje”.

# Tað lukkaða landið

HENRIK OLD



Ringt var at trúgva sínum egnu oyrum, nú boðað varð frá, at alt løgtingið hevði samtykt forboð fyri øllum lýsingartilfari á útlendskum máli. Sum skilst var hetta forboð ásett eftir boðum frá føroyska prestastýrinum (málnevndini).

Tað er greitt, at nøkur ynskja og hava altíð ynskt at steingja landið av fyri útlendskari ávirkan. Hetta hava serliga verið tey Kuba-trúgvu, blandað við fyrrverðandi DDR viðhaldsfólkini. Men at eingin annar mutar ímóti hevði eg ikki roknað við.

Dagin eftir samtyktina um forboðið boðar heimspressan frá, at Kubanar fyri fyrstu ferð sleppa inn í ein telduhandil, gott nokk kunnu teir ikki enn keypa eina teldu, sum har kostar 4.000 krónur, íneðan lønin sigst verða 150 krónur um mánaðin.

Í mínum barnaárum gleddist man serliga til tíðina, tá donsku príslistarnir komu í hvørt hús. Dreingirnir vóru mest spentir upp á tann frá Candor, har serliga øll útgerð til súkklurnar var at fáa, man stríddist við tað danska til at finna fram til, hvat skuldi bestillast. Hjá konufólkunum var tað helst tann hjá Daels og aðrir móta-príslistarnir, sum høvdu størsta áhugan. Helst lærdu fleiri enn eg meira danskt úr Candor príslistanum enn í skúlanum.

Ótrúligt at man kundi uppliva at fyrsta stigið í globaliseringini skuldi enda við einum forboði fyri øllum útlendslum tilfari.

Hugaligt verður, tá stórar europeiskar haldilsketur fara at senda lýsingartilfar á enskum til teir áleið 500 milliónur europearar, men samtíðis fáa at vita, at ímillum hesar 500 milliónir eru 48.000 fólk sum í fylgi prestastýrinum ikki tola at síggja ella lesa slíkt.

Ófatuligt at brúka fleiri 100 milliónir í skúlanum fyri at okkara børn skulu læra útlendskt mál, tá ið hesi so skulu brúka tað, so setur man forboð fyri tí møguleikanum.

Eg gangi út frá, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan gevur Málnevndini frávik (undantak) fyri at skipa fyri einum almennum báli, hvar øll húsarhald frívilliga bera á bálið alt útlendskt lýsingartilfar, tey kundu ligið inni við, áðrenn Málnevndin fer á húsarannsókn fyri at handtaka tey, sum ikki frívilliga hava latið alt útlendskt tilfar á bálið.

Undrist yvir mínar fyrrverðndi starvsfelagar í vinnunevndini, at teir samdir taka undir við harraboðum frá prestastýrinum. Totalt forboð ljóðar ikki sum eitt vinnuligt frambrot.

Næsta stigið verður væl at steðga útlendskum lýsingum á internetinum.

Havi hoyrt okkurt um, at man í Norðurkorea og á Burma hevur okkurt tílíkt system. So tað hevði verið upplagt, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum í einum av sínum mongu uttanlandsferðum millumlendi í Norðurkorea fyri at finna tað totala forboði.

Hurra fyri fyrsta átakinum í globaliseringini.